

*Fyrrapartin í gjár var gudstænasta, har David Johannesen, prestur, prædikaði*
Mynd: Jens Kr. Vang

lamisheimið í Vágum, søgdu tey, at Alma var væl fyri.

– Tá ið hon vaknaði, spurdi hon, hví vit ikki høvdu vakt hana fyrr í morgun. Jú, lagið er gott. Hon er ógvuliga glað, serstakliga takksom og væl fyri í morgun.

Í Vágum siga tey, at Alma er púra klár. Hon veit, hvørji øll síni eru – og hesi eru vorðin rættiliga mong í tali, sum árini eru gingin.

– Eygu og oyru eru farin at bila hjá henni, men Alma er uppi at kalla hvønn dag, og hon tekur eisini stokkarnar í hondina og bindur okkurt lætt, tá ið hon styttir sær stundir.

## Eftirkomarar

Alma Frederiksen, fødd Heinesen, er ættað úr Sandavági.

Foreldur hennara vóru Maria og Nicodemus Heinesen.

Í 1938 giftist hon Sigmundi Frederiksen, sum var miðvingur. Maðurin doyði í 1980.

Hon og maðurin búsettust í Miðvági, har Alma búði, til hon fyri fýra árum síðan í oktober fór á Ellis- og Avlamisheimið í Vágum.

Tvey av børnum hennara búgva í Vágum, eitt í Suðuroy, og trý búgva í Danmark.

Ígjøgnum eitt so langt lív, eigur Alma ein heilan hóp av eftirkomarum. Hon eigur nevniliga 26 ommubørn, 62 langommubørn og 11 oldurommubørn.

## Góðar hendur

Sum flestar kvinnur tá á døgum var Alma Frederiksen heima øll árini, eftir at hon var gift og hevði fingið børn at taka sær av.

Men á ungum árum var hon í Havn og lærdi tað, sum tey tá á døgum róptu "sløjd".

Hon lærdi at binda eitt nú kurvar, stólar og borð úr bambus, og hon tók eisini tað óvanliga stigið tá á døgum at hava kvøldskúla í Sandavági.

Alma hevur havt góðar hendur og hevur bundið nógv pløggini í langa lívi sínum.

Ein sermerkt løta í lívinum hjá henni var í fjør summar, tá ið hon slapp at hitta Margrethu drotning og Heindrik prins, sum stukku inn á gólvið á Ellis- og Avlamisheiminum á Føroyavitjanini í fjør.

Sosialurin ynskir Almu Frederiksen og familju hennara hjartaliga tillukku við degnum.



*Úr Vágum siga tey, at eini 250 fólk nýttu høvi at heilsa Almu á føðingardegnum*
Mynd: Jens Kr. Vang



*Alma Frederiksen er væl fyri eftir høga aldrinum. Hon er klár og veit, hvørji øll hennara eru – og tey eru mong í tali*
Mynd: Jens Kr. Vang